taka út.

Súsanna fekk eisini aðra hjálp. Á hvalastøðini við Áir høvdu teir einaferð lovað olmussu. Súsanna skuldu fáa tvey mál av tvøsti, um 200 kg, um teir fingu eitt ávíst tal av hvali fyri árið. Tað fingu teir eisini, og Súsanna fekk olmussuna!

Tað var tungt hjá mammuni at hava øll børnini inni, ikki minst tí hon var við barn nú, hon fekk hesi ringu tíðindini.

Johan fór til Hósvíkar at vera hjá einum hjúnum, Petrina og Andrass í Toftum, sum vóru barnleys. Hann hevði tað gott, men honum longdist sera illa norður aftur til mammu og systkin.

Tað hendi seg meira enn so, at hann rann norður til Sundhøvda, haðani hann so rópti eftir beiggjunum at koma yvir um sundið við báti eftir sær.

Tey búðu niðri á bakkanum. Pápin hevði havt ætlanir um at hava húsini so niðarlaga, at hann kundi hava neyst í kjallaranum. So tað var spælt nógv niðri í fjøruni, og mamman fekk manga nátt at ganga við at vaska karmar.

## Dreingirnir tóku um endan

Annars vóru tað dreingirnir í húsinum, sum komu at taka um endan við mannfólkaarbeiði. Men Niels fór skjótt av landinum, og næsti drongurin Kristian doyði 21 ára gamal. Tá var tað Símun, sum kom at taka við. Hann fær tað ummæli frá sínum, at hann var eitt rættuligt álit hjá mammuni og systkjunum.

Í Sundalagnum var nógvur matur. Her var millum annað nógvur seiður. Eisini fingu tey øður. Hetta er fínur matur í dag, men var ikki tá roknað sum nakað serligt. Hetta var jú agn!

Fólk vóru sera hálpsom. Hetta var ikki minst galdandi fyri brøðurnar Jógvan og Poul á Oyri og handilin hjá teimum. Tað stóð ikki á hjá teimum hjá Óla Jákup at skriva vørur hjá teimum. Tá tað so var arbeitt eitt ella annað, so var hetta góðskrivað kontoini. Hetta var ein lagaligheit, sum kom mongum væl við.

Tað kom eisini hjálp aðra staðni frá. Súsanna hevði verið á háskúla saman við Petru, sum var gift við Sámal P. Petersen, jun., reiðara og keypmanni í Fuglafirði, vanliga kallaður Piddi. Tær vóru báðar úr Kollafirði og vóru eisini skyldkonur. Til jóla kom hvørt ár ein stórur jólapakki frá Petru. Hetta minnist Óla Jákup væl á enn, og hetta kom eisini serliga fram fyri hann, tá ið hann sum lærari í Fuglafirði hevði ommubørn hjá Petru sum næmingar.

Her skal eisini vera nevnt, at systir Elsu Jacobsen, Lea, var gift við Bernhard Juul úr Søldafirði. Hann plagdi sum drongur at vera hjá eini mostur á Oyrabakka. Tá plagdi hann at vera inni á gólvinum hjá Súsannu, og hann plagdi at taka til, hvussu væl, hann var móttikin inni hjá teimum. Her var annars altíð nógv av ungdómi inni.

## Sámal Jákup

Sámal Jákup var føddur í 1893. Hann giftist við Súsannu, vanliga kallað Sanna, f. Djurhuus úr Hósvík. Hann varð fiskimaður og sigldi um motorpassari.

Tey búsettust, eins og Óla Jákup, Undir Vørðuni í Hósvík. Sámal Jákup hjálpti eisini beiggjanum sum skómakari.

Sámal Jákup var ógvuliga fittur í hondunum, hann smíðaði og skar í træ. Hann gjørdi eisini klokkur og ur í stand fyri fólk. Eisini seymaði hann klæðir til børnini, so sum frakkar og annað.

Umleið 1926-29 gjørdist hann sjúkur av tuberklum, og var hann á Sanatoriinum í Hoydølum. Her gjørdi hann nógv við at skera í træ fyri fólk.

Tað er ikki nógv vitað um hansara sjólív, men hann var í hvussu er í 1922 við Silver Belle.

Táið hann fór síðsta túr við Nólsoy, tænti dóttirin Svanhild í Havn niðri í Rættará hjá foreldrunum hjá Jákup Lindenskov. Hon sigur, at pápin kom niðan har at siga henni farvæl, ikki bara eina ferð, men tvær ferðir.

Húsini hjá Sámal Jákup og Sannu fóru í vindi eina nátt í 1943. Har vóru Sanna og fýra børn inni. Vindurin tók yvirtromina, har ein vaksin sonur svav, og fór hann einar 100 m við tromini. Hann kom óskaddur frá hendingini. Hini trý lógu øll í somu song í stovuni, og var tað seingin, ið bjargaði teimum, tá loftið datt niður á seingjarstólparnar, og tey lógu óskadd undir.

Eisini kúgvin, ið stóð í kjallaranum, kom óskadd frá hendingini. Har brotnaði alt inni, ið brotna kundi. Har var ikki so frægt sum ein tallerkur heilur. Eitt ár seinni fluttu tey inn í nýggj hús, sum vórðu bygt á sama stað.

## Børnini

Sámal Jákup og Sanna áttu 12 børn. Tey vóru:

**Maria f. 1916.** Gift við Petur Poulsen av Kirkju. Búsettust í Klaksvík.

**Svanhild f. 1917**. Giftist við Zakarias Zachariassen úr Hesti. Arbeiddi nógv ár á telefonverkinum.




*Sámal Jákup var við Silver Belle í 1922. Her er manningin avmyndað av Absalon Joensen Seyðisfirði:* ***Aftast f.v.:*** *Sørin Djurhuus, Hósvík, Einar Einarsson, Rituvík, Jákup Nielsen, Nólsoy.* ***Mittast:*** *Hendrik Olsen, Rituvík, Martin Djurhuus, Hósvík, Sámal Jákup Jacobsen, Hósvík, Jógvan úr Æðuvík, Esmar Thomsen, Kollafjørður, næstan fjaldur, Hanus í Rituvík, Heini í Elduvík, Glyvrar.* ***Fremst:*** *Ingimundur Petersen, Rituvík, Per hjá Vensil á Glyvrum, Sofus hjá Jógvan í Rituvík, Magnus Olsen, skipari, Rituvík, Debes Danielsen, Heiðunum, Sofus Lillaa, Lorvík, Jógvan í Heiðristovu, Nólsoy. Tað sær út sum at møti hevur verið umborð.*



*Sanna, kona Óla Jákup, saman við nøkrum av hennara 12 børnum.* ***Tey eru f.v.:*** *Hannis, Robert, Alfred, Anna, Sanna, mamman, Lisa, Svanhild, Mia og Sámal Jákup fremstur*

**Solgerð f. 1918.** Arbeiddi nógv ár á røktardeildini á landssjúkrahúsinum.

**Johannes f. 1920.** Giftist við Sofíu Hansen úr Vestmanna.

**Lydia f. 1922.** Giftist í Onglandi.

**Stendor f. 1923.** Doyði 12 ára gamal av blóðeitran

**Steingrim f. 1925.** Giftist við Hansu Poulsen á Strondum. Var sjómaður

**Alfred f. 1926.** Kendur sum skipari á Smyrli.

**Robert f. 1928.** Uppfostraður í Havn og fekk eftirnavnið Lindenskov. Giftist við Esther Højgaard av Húsum. Var maskinmeistari.

**Julina Lisa f. 1930.** Giftist í Danmark. Var sjúkrasystir

**Anna Kristina f. 1933.** Giftist við Harry Jacobsen av Morskranesi. Búðu í Havn

**Sámal Jákup f. 1934.** Giftist við Miu Frederiksen, ættað úr Svínoy. Hann doyði knappliga umborð á skipi sínum Vesturland í 1977.

Hesi systkin komu umframt út fyri teirri vanlagnu umframt at missa pápan, at allir beiggjarnir doyðu ungir.

Tað var sera gott samband millum familjunar hjá Óla Jákup og Sámal Jákup. Tey komu at kenna seg sum meira enn vanlig systkinabørn. Ein dóttir Lydia fór norður til eiðislæknan at vera. Tá ið tey fóru norður til Eiðis at vitja hana komu tey altíð inn á gólvið á Oyrabakka.

Tey plagdu eisini at rógva millum Hósvík og Oyrabakka at vitja hvønn annan.